Uttangarðsútskifting í Hesti

# Býtið

**av**

# Hestshaga, Innaraparti

# matr.nr. 35-91



Pag. 2998 Mikudagin 14. september 2011 kl. 13.00 varð útskiftingarfundur settur í bygdarstovuni í Hesti at viðgera

# Uttangarðsgarðsútskifting

**av**

**hagapartinum**

## Hestshagi, Innarahelvt

| | |
|---|---|
| Nevndin møtti fullmannað: | Petur Nielsen, formaður<br>Jytta Juul<br>Olaf í Garði Joensen |
| Frá Umhvørvisstovuni: | Jógvan Frýdal<br>Óli Johansen |
| Á fundinum møttu | 16 eigarar |

Fram varð lagt:

Skjal 1. Lýsingar í Dimmalætting og Sosialinum 29. august 2011 og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Fundurin er soleiðis lógliga lýstur og settur.

Skjal 2. Bræv frá Innlendismálaráðnum, dagfest 28. januar 2009, har Petur Nielsen er uppnevndur sum formaður í uttangarðsútskiftingarnevndini í Hesti.

Skjal 3. Við skrivi, dagfest 21. oktober 2010, hevur formaðurin biðið Føroya Rætt um at uppnevna nevndarlimir, og hevur rætturin tann 3. november 2010 uppnevnt nevndarlimir og tiltakslimir.

Nevndarlimir:

1. Olaf í Garði Joensen, Eiði
2. Jytta Juul, Funningur

Tiltakslimir:

1. Rasmus skorheim, Selatrað
2. Eyðfinnur Hansen, Klaksvík
3. Jógvan F. Nicodemussen, Sandur
4. Maria Gregersen, Syðrugøta

Gegnið hjá nevndarlimunum varð kannað, og vita nevndarlimirnir seg ikki vera skyldar ella svágdar við nakran jarðareigara í Hesti, so at tað nemur teirra gegni, sbr. grein 8, stk. 5 í útskiftingarlógini.

Eingin mótmælti samansetingini av nevndini.

pag. 2899 Formaðurin og nevndarlimirnir hava áður undirskrivað váttanina um:

"At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, sum liggja á mær sum útskiftingar-nevndarlimur, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum".

Skjal 4. Grannastevnuviðtøkan frá 3. mai 2007 var framløgd.

Vísandi til grein 10 í útskiftingarlógini varð spurt um teir, sum høvdu lagt málið fyri á grannastevnu, nú tóku málið aftur.

Eingin tók orðið í hesum sambandi.

Sanna Silvurstein, ið hevur lagt málið fram á grannastevnu, segði, at hon ynskti at fáa einbýttan haga til festi hjá sær, ið er 5 mk. 12 gl.

Skipanin í haganum er 290 áseyð og verður rikin í tveimum eins stórum gongum.

Jóhannes Joensen vísti á kortinum, hvar eitt møguligt mark kundi verið. Hann segði, at á vestursíðuni er best at hava markið í Stuttunum, og at hagin kundi býtast eftir vídd.

Fundurin lokin.

**Petur Nielsen** **Jytta Juul** **Olaf í Garði Joensen**

Eftir fundin varð farið í hagan. Við vóru: Olaf í Garði Joensen, Jógvan Frýdal, Óli Johansen, Jóhannes Joensen, Hans Elias Johannesen, Petur Lyngvej og Petur Nielsen.

Gingið varð niðan á Lítlhamar, eftir Longugøtu og ovaru Longugøtu, fram við Fransaholuni niðan á Oyggj. Hagani niðan á Tvørabrekku, eftir eystaru eggini norður á

pag. 2900 ovaru Slættir. Hannis og Petur vístu á, hvar best var at hava mark í Stuttunum. Farið varð niðan á Eggjarók, fram við eggini suður á Heyggin Mikla. Hugt varð niður í Norðaraberg og Brattaberg. Síðan var gingið heim til portrið í Svæð og eftir gøtuni til hús.

Á fundi umborð á Teistanum á leiðini úr oynni metti nevndin, at grundarlag er fyri at býta hagan, og avgjørdi, at skiftið verður at fremja.

**Petur Nielsen** **Jytta Juul** **Olaf í Garði Joensen**

pag. 2998 Ár 2011 mikudagin 14. desember kl. 9.30 varð útskiftingarfundur settur í bygdarstovuni í Hesti at viðgera uttangarðsgarðsútskiftingina av hagapartinum Innaruhelvt.

Nevndin møtti fullmannað: Petur Nielsen, formaður, Olaf í Garði Joensen og Jytte Juul, nevndarlimir. Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal, Óli Johansen og Jóhann Lützen.

14 fólk møttu.

Fram var lagt:

Skjal 6: Útskiftingarætlan

Skjal 7: Eigaralisti

Freistin at gera viðmerkingar til nevndu skjøl varð sett til 11. jan. 2012. Viðmerkingarnar skulu sendast útskiftingarnevndini, sum heldur til á Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, 160 Argir.

**Petur Nielsen** **Jytta Juul** **Olaf í Garði Joensen**

Pag. 2912 Ár 2012 tann 29. mars kl. 15, kom útskiftingarnevndin fyri Innaruhelvt í Hesti saman til at viðgera málið um býtið av haganum.

Nevndin møtti fullmannað.

Gerðabókin pag. 2900 varð lisin upp.

Eingin viðmerking var komin til fyribilsætlanina, ið varð framløgd 14. desember 2011.

Útskiftingarnevndin er samd um at staðfesta fyribilsætlanina.

Úrskurður:

Innarahelvt verður býtt í tveir partar soleiðis (skjal 7):

**91a 05-12-00 Innarahelvt**

| matr.nr | partur | eigari |
|---|---|---|
| 27a | 05-12-00 | Føroya Jarðargrunnur |

**91b 03-04-00 Miðjan**

| | matr.nr | partur | eigarar |
|---|---|---|---|
| | 2 | 00-02-18 | Hallur C & Sæbjørn Johannesen |
| | 4 | 00-01-00 | Dánjal Pauli Danielsen |
| | 7a | 00-01-10 | Hjalgrím Hentze |
| | | | Elin í Jákupsstovu |
| | | | Anna Charlotta Rasmussen |
| | | | Hjallgrím Petur Hentze |
| | | | Anna Charlotta Rasmussen |
| | | | Elin Katrina í Jákupsstovu |
| | 15 | 00-01-00 | Hergeir Joensen,Argir |
| | | | Sanna Silvurstein |
| Pag. 2913 | 18 | 00-01-00 | Óli Joensen |
| | 19 | 00-01-00 | Óli Joensen |
| | 22 | 00-02-00 | Sæbjørn Johannesen |
| | | | Hallur Johannesen |
| | 24 | 00-03-15 | Sæbjørn Johannesen |
| | | | Ólavur Hallur Johannesen |
| | 28 | 01-04-00 | Føroya Jarðargrunnur |
| | 36 | 00-02-00 | Peter Lyngvej |
| | | | Anna Larsen |
| | | | Emmely Thøgesen |
| | | | Eyðbjørg Joensen |
| | | | Ruth Lyngvej |
| | | | Tróndur Lyngvej |
| | | | Súni Lyngvej |
| | | | Marjun Lyngvej |
| | | | Jóna Lyngvej |
| | | | Elsa Lyngvej |
| | 46 | 00-02-00 | Árni Nybo |

| | | |
|---|---|---|
| 48 | 00-02-00 | Fríðbjørg Zachariassen |
| | | Fríðbjørg Zachariassen |
| 50 | 00-01-10 | Jacob Pauli Silvurstein |
| 52 | 00-01-10 | Jacob Pauli Nybo |
| 53 | 00-01-15 | Jacob Pauli Nybo |
| 62 | 00-04-00 | Poul Johannes Poulsen |
| | | Odmar Poulsen |
| | | Hjørleif Poulsen |
| | | Gunvør Clementsen |
| 76 | 00-01-10 | Ebbe Rasmussen |
| 93 | 00-01-12 | Jacob Pauli Nybo |

Markið millum hagarnar eftir býtið verður, sum skjal nr. 6 (fyribilsætlanin) vísir.
Býtið skal fremjast í klipping 2012.

Pag. 2914 Ásetingar:

Tiltøk í haganum, ból, stik o. a. falla til hagapartin, tey eru í.

Rættin í Geilini (litra e) verður í felag hjá nýggju høgunum Innaruhelvt og Miðjuni.

Matr. nr. 14, Heimaragjógv, verður ogn hjá nyggja haganum Innaruhelvt.

Bøgarðarnir verða býttir, sum skjal 8 vísir.

Hagarnir hava øll rættindi inni á sær sjálvum.

Áseyðurin verður býttur eftir markatalinum, og letur gamli hagin hagfastan seyð til teir nýggju hagarnar.

Ogn og skuld verða býtt eftir markatalinum.

Álagt verður Umhvørvisstovuni at seta markið millum nýggju hagarnar skjótast til ber, eftir at kærufreistin er úti.

Umhvørvisstovan ger upp útskiftingarroknskapin, og verður eigaranna partur av kostnaðinum álíknaður nýggju høgunum eftir markatalinum.

Úrslitið av útskiftingini verður kunngjørt við lýsing og skrivi til eigararnar saman við úrdrátti úr gerðabókini og endurprenti av kapitul 9 í útskiftingarlógini um "Anke og gennemsyn”.

Útskiftingin verður latin til ákæru. Kærufreistin er 3 mánaðir frá tí degi, útskiftingin er kunngjørd. Kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, Postboks 28, 110 Tórshavn, og vera honum í hendi í seinasta lagi 23. juli 2012.

Gerðabókin lisin.

Útskiftingin endað.

**Petur Nielsen** **Jytta Juul** **Olaf í Garði Joensen**